# Stuðulspolitikkur til mentanarstuðul frá Vestmanna kommunu

## Kapittul 1 - Endamál

§1. Stuðulspolitikkurin er eitt amboð til viðgerð av stuðulsumsóknum til Vestmanna kommunu.

Endamálið við stuðulspolitikkinum er:

1. at lýsa, hvønn stuðul kann verða latin til,
2. at greiða frá, hvør tekur avgerð um stuðul.

## Kapittul 2 - Hvonn stuðul kann verða latin til

§2. Stuðulin er í høvuðsheitinum ætlaður at stuðla mentanarligum tiltøkum og verkætlanum í Vestmanna kommunu.

§3. Felagsskapir, sum eru á fíggjarlóg landsins, fáa ikki stuðul frá Vestmanna kommunu.

§4. Felagsskapir, sum fevna um alt landið, fáa ikki stuðul frá Vestmanna kommunu.

## Kapittul 3 - Stuðul til mentanarlig endamál

§5. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur kunnu søkja um stuðul til alment gagnligar framførslur, verkætlanir og líknandi, sum verða hildnar í Vestmanna.

§6. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur, sum búgva, eru uppvaksin ella eru heimahoyrandi í Vestmanna kommunu, kunnu søkja um stuðul.

## Kapittul 4 - Stuðul til námsferðir

§7. Stuðulin á kr. 500 til námsferðir verður veittur næmingum, sum eru undir lesnaði, eftir fólkaskúlan, og sum búgva í Vestmanna kommunu.

## Kapitul 5 — umsókn um leigan av hølum

§8. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur kunnu søkja um stuðul til leigan av hølum hjá kommununi.

## Kapittul 6 - Mannagongdir og freistir

§9. Stuðlsumsóknir skulu sendast kommununi við at nýta Vangan, ið er í teiginum Mentanarstuðul á heimasíðuni hjá kommununi. Um tað av eini ella aðrari orsøk ikki ber til at søkja á Vanganum, kann umsøkjarin seta seg í samband við umsitingina hjá kommununi.

§10. Stuðulin er treytaður av, at ein fíggjarætlan fyri verkætlanina er viðfest. Um fyritreytirnar fyri eini játtan broytast munandi, kann kommunan gera av ikki at útgjalda játtaðan stuðul.

§ 11. Umsóknir um stuðul skulu verða kommununi i hendi í góðari tíð, innan peningurin skal nýtast. Umsóknir verða viðgjørdar á fundum hjá fíggjarnevndini.

§ 12. Umsóknir sambært kapittul 4 og 5 verða viðgjørdar av umsitingini sambært hesum leiðreglum.

§ 13. Stuðul millum 3-10.000 krónur verður beinleiðis játtaður og avgreiddur av fíggjarnevndini. Stuðul yvir 10.000 krónur verður avgreiddur av bygdarráðnum eftir tilmæli frá fíggjarnevndini.

§14. Stuðul upp til 3000 krónur verður avgreiddur av umsitingini. Verður stuðul játtaður eftir hesi grein, skal hann latast av samlaðu stuðulsjáttanini. Umsóknir viðgjørdar eftir hesi grein, skulu viðgerast sambært samtykta stuðulspolitikkinum, eins og umsóknir um størri upphæddir verða tað

## Kapittul 7 — Játtaður stuðul

§15. Stuðulin verður útgoldin eftir, at verkætlanin er framd, um ikki onnur avtala er gjørd.

§16. Stuðul fellur burtur eitt ár eftir, at hann er játtaður, um ikki onnur avtala er gjørd.

Stuðulspolitikkur hjá Vestmanna kommunu samtyktur av bygdarráðnum 23.11.2023, við broytingum samtyktar av bygdarráðnum tann 19. november 2025.

Sára

Såra J6gvansdåttir,
borgarstjöri